## Alduorkuverk um trý ár

Í 2007 fer heimsins største alduorkuverk at lata dønum elektriskan streym. Tað skrivar blaðið Nordjyske Stiftstidende.

Verkið skal eftir ætlanini setast upp við Horns Rev uttan fyri Esbjerg og fer at kosta góðar 100 milliónir krónur. Við Horns Rev hava danir 80 stórar vindmyllur, sum framleiða elorku til brúkarar á landi, og granskararnir siga, at um nøkur fá ár verður tað líka bíligt at framleiða elorku við alduorku sum við vindorku.

Bretar eru í ferð við at byggja sær eitt alduorkuverk. Tað verður í Wales og verður ætlandi tikið í nýtslu næsta ár, skrivar Nordjyske Stiftstidende.

## Illa umtóktur leiðari

Albanski meirilutin í Kosovo hevur gjørt av at velja Ramush Haradinaj til forsætisráðharra, og tað hevur fingið øði í tann serbiska minnilutan.

Ramush Haradinaj stóð á odda fyri einum albanskum hernaðarbólki í krígnum í Kosovo, og serbarnir vilja vera við, at hann er sekur í krígsbrotsverki. Teir vísa eisini á, at fyri stuttum var hann tríggjar ferðir til avhoyringar hjá krígsbrotsmannadómstólinum. Nógvir albanar halda eisini, at hann hevur lagt ovurhonds nógvar pengar undir seg tey seinastu árini.

Tað hevur eisini vakt undran, at ST-leiðslan í Kosovo hevur góðtikið, at Ramush Haradinaj verður forsætisráðharri, men leiðarin í ST-umsitingini, danin Søren Jessen-Petersen, hevur sagt, at hann noyðist at viðurkenna avgerðina hjá albanska meirilutanum.

## Virus kostar milliardir

Tey, sum hava teldu, kunnu rokna við at fáa fleiri virusvitjanir í framtíðini, tí serfrøðingar vænta eina veruliga virusbylgju um ikki so langa tíð.

Joakim von Braun, sum er virusserfrøðingur hjá svensku fyritøkuni Symantec, sigur við Aftonbladet, at teir fyrstu seks mánaðarnar í ár vórðu ikki færri enn 45.000 nýggir ormar avdúkaðir, og tað er nógv meiri enn onnur ár.

Virusálopini kosta ovurhonds nógvar pengar. Sambært einum yvirliti hjá Computer Economics gjørdu virusini Love Bug, Mydoom og Sobiq skaða fyri næstan 15 milliardir dollaar. Tað ringasta var kortini Love Bug, sum gjørdi um seg í 2000, og sum gjørdi skaða fyri næstan níggju milliardir dollarar.

Joakim von Braun sigur við Aftonbladet, at tað verður verri enn. Hann væntar, at virusálopini fara at økjast nógv tey bæði næstu árini, og at tey fara at gera skaða fyri munandi meiri pengar enn tey álopini, sum vit hava havt higartil.

## Málið slept

Týska ákæruvaldið hevur gjørt av at sleppa einari ákæru ímóti rocksangaranum Ian Gallagher.

Upprunin til málið var ein bardagi á einum vertshúsi í Múnchen fyri tveimum árum síðani. Ian Galagher var mitt í rokanum, og løgreglan vil vera við, at hann sparkaði ein løgreglumann. Hann bleiv tikin og avhoyrdur fleiri ferðir, men sambært ákæruvaldinum eru vitnifráðgreiðingarnar so ymiskar, at tað letur seg ikki gera at ákæra hann fyri ágang ímóti løgregluni.

Heilt snikkaleysur sleppur Ian Galagher kortini ikki, tí han skal rinda 400.000 krónur í bót, men tað man hann hava ráð til.



*Nógvastaðni hava fólk mótmælt, at umboð fyri ST vórðu burturflutt. Her eru tað fólk í Kosovo, sum ganga við myndum av gíslunum*

*Mynd: Reuters*

# Gíslar slopnir leysir

**Trý starvsfólk hjá ST, sum hava sitið gíslar í Afganistan í næstan fýra vikur, sluppu leys í gjár**

GÍSLATØKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tey trý ST-starvsfólkini, Annetta Flanigan úr Norðurírlandi, Angelito Nyan úr Filipsoyggjunum og Shqipe Hebibi úr Kosovo, vórðu burturflutt í mi´ðbýnum í afganska høvuðsstaðnum Kabul tann 28. oktober.

Gíslarænararnir kunngjørdu seinni, at teir vóru úr einum bólki hjá Talibanrørsluni, og teir kravdu, at allir útlendskir hermenn skuldu fara úr Afganistan. Varð kravið ikki eftirlíkað, fóru teir at avrætta tey trý ST-starvafólkini.

Í gjár sluppu tey leys. Afgansku myndugleikarnir sýttu fyri at greiða frá, hvussu tey vóru sloppin leys, men amerikanskar keldur søgdu, at hermenn vóru komnir fram á gíslarænararnar og høvdu fríað gíslarnar. Sambært keldunum doyðu tríggir gíslarænarar í atsókníni, og ein fjórði varð særdur.

Annetta Flanigan, Angelito Nyan og Shqipe Hebibi fóru til Afganistan at hjálpa afgansku myndugleikunum við forsetavalinum, sum var tann 9. oktober. ST-umboð søgdu í gjár, at tey høvdu tað gott, hóast tey hava sitið gíslar í næstan fýra vikur.

# 24 prosent vilja hava hann

**Mahmoud Abbas verður tað almenna valevnið á palestinska forsetavalinum í januar**

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá Yasser Arafat doyði, bleiv fyrrverandi forsætisráðharrin Mahmoud Abbas valdur til nýggjan formann í PLO, og nú er avgjørt, at hann skal stilla upp til palestinska forsetavalið.

Men sambært einari veljarakanning, sum lærdi háskúlin í Nablus hevur gjørt, ætla bara 24 prosent av veljarunum at geva Mahmoud Abbas krossin. Sama kanning vísir, at teir flestu palestinararnir halda ikki, at hann er førur fyri at taka við palestinsku leiðsluni eftir Arafat.

Heldur ikki Ahmed Qurie, forsætisráðharri, er høgt í metum ímillum palestinar. Bara fýra prosent siga, at tey høvdu atkvøtt fyri honum, stillar hann upp til forsetavalið, og 56 prosent halda heldur ikki, at hann er egnaður at vera forsætisráðhari.

Kanningin hjá lærda háskúlanum í Nablus avdúkar eins og ein kanning í september, at tann fongslaði Fatah-leiðarin Marwan Barghouti er betur umtóktur enn teir leiðandi politikararnir. Barghouti situr í fongsli í Ísrael, men tað ljóðar, at hann ætlar at stilla upp kortini. Í september søgdu meiri enn 50 prosent av palestinunum, at tey vildu hava hann at taka við eftir Arafat.

Lesið Sosialin - so eru tit við



Bjørn Kalsø, landsstýrismaður:

# Vit steðgaðu ikki Saksabergi

**– Men landsstýrið hevur ikki givið skipum loyvi til at trola eftir sild á hesum leiðum, tí vandi er fyri, at uppíblanding verður av smáum upsa og øðrum fiskasløgum, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður**

SILD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Søgur hava gingið um, at føroyskir myndugleikar steðgaðu royndini hjá Saksabergi sum bar við sild á Sandoyarbankanum herfyri, men hesum afturvísir landsstýrismaðurin, Bjørn Kalsø*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Herfyri fekk Saksaberg nakað av sild við nót á Sandoyarbankanum.

Teir gjørdu nakrar túrar, har teir fingu upp í eini 50 tons á teimum fyrru túrunum.

Fiskirannsóknarstovan kannaði sildina, sum skipið legði upp í Kollafirði, og kanningarnar vístu, at umleið 1/3 av veiðini var norðhavssild, sum gýtir um várið og 2/3 hetlandssild, sum gýtir um heystið.

### Spenningur

At norðhavssild var uppi í veiðini á Sandoyarbankanum fekk menn, sum eiga pelagisku skipini og teir, sum eru við hesum skipum, at gerast spentar, tí kanska var hetta ein ábending um, at norðhavssildin er í ferð við at taka uppaftur gamla ferðamynstrið.

Og tað er júst ferðamynstrið, sum er ein týðandi táttur – og partvís ein stríðsspurningur – í tí býti av sildini, sum er millum strandalondini, har Noregi heldur seg fáa ov lítið í sín part.

Eftir at Saksaberg hevði borið við sildina á Sandoyarbankanum, ringdi ein nótaskipareiðari til Sosialin og helt fyri, at nú áttu føroyingar at sent hvørja »fjøl« út á bankan fyri at fáa staðfest hvussu nógv sild, talan er um á okkara leiðum.

### Ikki steðgaður

Tað hevur verið sagt, at fiskiskapurin hjá Saksabergi varð steðgaður av landsins myndugleikum, men hesum vísir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, aftur.

– Vit hava valt at halda okkum til kvotuna av norðhavssild, men í hesum førinum lótu vit Saksaberg royndarfiska við nót. Tað hevur helst ikki loyst seg hjá teimum, tá ið veðrið gjørdist meira ruskut, og sildin stóð djúpt. Fiskiskapurin fjarðaði burtur, og tí fór Saksaberg aðrastaðni at royna.

Bjørn Kalsø viðgongur tó, at landsstýrið ikki hevur givið skipum loyvi til at trola eftir sild á hesum leiðum, tí vandi er fyri, at uppíblanding verður av smáum upsa og øðrum fiskasløgum.

– Tað hevur verið eitt ávíst trýst frá pørtum av vinnuni at sleppa at trola eftir sild, men hetta hava vit so higartil ikki givið loyvi til, sigur landsstýrismaðurin í stuttari viðmerking.

Sosialurin royndi í gjár at fáa eina viðmerking frá Jákupi Jacobsen, reiðara á Saksabergi, men hann sat á fundi, tá ið vit frættu úr Gøtu.

# Sjálvandi vil fiskimaður sleppa at fiska

**– Men tað ger einki, um nakrar norðhavssildir sleppa inn í føroyskan sjógv – uttan neyðturviliga at verða dripnar, sigur Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni**

SILD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, heldur ikki, at talan hevur verið um tær heilt stóru nøgdirnar av sild á Sandoyarbankanum á hesum sinni.

– Men fer tað at vísa seg, sum tíðin líður, at norðhavssildin tekur uppaftur gamla ferðamynstrið, broytist okkara samráðingargrundarlag eisini.



*– Norðmenn góðtaka ikki avtaluna, sum hevur verið galdandi seinastu árini um býtið av norðhavssildini, og tí hava teir noktað útlendskum skipum at fiska sild innanfyri egið 200 fjórðinga fiskimark, sigur Hjalti í Jákupsstovu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Norðmenn misnøgdir

Hjalti vísir á, at Noreg hevur í seinastuni verið misnøgt við býtið av heildarkvotuni av norðhavssild, tí teir halda, at grundarlagið fyri býtinum eigur at broytast.

– Teir góðtaka ikki avtaluna, sum hevur verið galdandi seinastu árini, og tí hava teir noktað útlendskum skipum at fiska innanfyri egið 200 fjórðinga fiskimark. Teir siga seg ikki viljað taka uppaftur samstarvið, fyrr enn teir fáa meira í sín part. Hinvegin hava føroyingar, íslendingar og ES-londini, sum eru tengd at avtaluni, hildið fast um gamla býtið av sildini – og hava tikið sær rætt til at fiska tann partin, sum londini tá vóru samd um, sigur hann.

Spurdur, um hann heldur, at myndugleikarnir í Føroyum áttu at loyvt troling eftir sild í føroyskum sjógvi, nú Saksaberg fann sild á Sandoyarbankanum, sigur Hjalti í Jákupsstovu:

– Sjálvandi vil ein fiskimaður sleppa at fiska so nógv sum tilber – og upp á so stutta tíð sum tilber, men vit hava eina avtalu at halda okkum til, og eg haldi, tað er rætt, at londini so vítt gjørligt samstarva um hetta tilfeingi.

### Tað ger einki…

Hjalti í Jákupsstovu heldur ikki, tað ger nakað, um nakrar norðhavssildir sleppa inn í føroyskan sjógv – uttan neyðturviliga at verða dripnar, sum hann tekur til.

– Eg haldi sum nevnt ikki, at talan var um so nógva sild í hesum umfarinum, men vit kunnu bara vóna, at talan verður um størri nøgdir, sum tíðir líðir, sigur leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni at enda.

# Ein dýrur toskur

**Manningin á Sjóstjørnuni fekk ikki minni enn kr. 10.160 fyri tann eina toskin, teir fingu í farna ári**

FISKAMERKIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hósdagin, 11. november, skipaði Fiskirannsóknarstovan fyri lutakasti um tær kr. 10.000 fyri vinnandi fiskamerkið. Lutakastið fór fram í kantinuni á Fiskavirking í Saltangará, og tað var Petur Henry Mohr úr Saltangará, sum tók vinnandi seðilin undir eftirliti av Tórhalli Patursson, sum arbeiðir hjá Landsgrannskoðanini.

Tilsamans 783 fiskamerkir eru latin Fiskirannsóknarstovuni seinastu 12 mánaðirnar. Av teimum luttóku 736 í lutakastinum um vinningin. Hini 47 merkini, sum ikki vóru við í lutakastinum, eru annaðhvørt latin inn av fólki, sum hava beinleiðis tilknýti til Fiskirannsóknarstovuna ella eru frá virkjum og stovnum uttanlands.

Tað var manningin á Sjóstjørnuni, sum vann lutakastið og tær kr. 10.000, og tað var eisini manningin á hesum báti, sum hevði latið flest merkir inn, nevniliga 42 í tali.

Vinnandi fiskamerkið var av einum toski, sum er merktur vestanfyri Suðuroynna í oktober 2002. Toskurin varð fingin aftur á umleið somu leið - eitt ár seinni.

Hesin eini toskurin má sigast at hava fingið ein sera góðan prís. Fyrst fekk sendarin kr. 100 fyri fiskin umframt kiloprísin, sum gevur umleið kr. 160. Aftrat hesum komu so tær kr. 10.000, sum var virðislønin fyri at vinna kappingina.